

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 02 - 08 - 2012

# FAS skipanin hevur borið frukt

FAS-skipanin hevur borið frukt. Vit hava hildið tær strategiir, sum vit hava sett út í kortið, nevniliga at vit í 2012 skulu røkka 100 skipum, og vit hava í dag 80. Vit eru loksins komin á Hvíta lista, sum ger, at føroyska merkið og føroyska skrásetingin eru eitt kvalitetsregistar í altjóða høpi og hetta mugu vit verja um, segði Johan Dahl, landsstýrismaður undir viðgerðini av løgmansrøðuni í vikuni. Hann segði víðari, at vit mugu tryggja, at vit ikki við lóggávu gera, at okkara egnu skipanir ikki vera kappingarførar við við tær skipanir vit kappast við. Vit kappast um arbeiðsmegi og dugnalig fólk. Og tað snýr seg um at fáa eina so stóra skráseting við kvalitetsskipum, at vit fáa tær avleiddu vinnurnar, sum vit alla tíðina hava tosað um skulu koma. Og tað er eingin ivi um, at tær koma, tá vit hava fingið eina ávísa stødd av skrásettum skipum. Eg ivist heldur ikki í, at vit tey komandi árini fara at síggja avleitt virksemi vaksa á landi, og at vit í almennum høpi fara at bjóða fram skeið ol., sum koma at gagna føroyska samfelagnum. Johan Dahl nevndi eisini vaksandi talið av føroyingum, sum arbeiða í frálandavinnuni, og sum harvið byggja upp eina stóra vitan, sum so aftur kann vera okkum til gagns, tá vit einaferð koma hartil, at vit hava funnið oljuna. Hetta er sjálvandi framtíð, men hetta er ikki ein dreymur men ein vón um, at vit fáa vinning burtur úr eini komandi oljuvinnu, og at hon verður gagnlig fyri okkara samfelag.